## Kristiliga Sangkórið aftur undir venjingar

Í annaðkvøld, týskvøldið 22. september, fer Kristiliga Sangkórið aftur undir vetrarhálvuna. Kórleiðari er Hanus Joensen, og hann sigur, at nýggir limir eru vælkomnir upp í kórið. Venjingin í annakvøld er klokkan 19.30 í KFUM í Havn.



## Kvinna og børn myrd

Løgreglan í syðra parti av amerikanska statinum Florida fann um vikuskifti fimm børn og mammu teirra deyð í einari íbúð. Tey vóru myrd, og løgreglan leitar nú eftir pápanum, skrivar AP. Tað var í gjár, at løgreglan í býnum Naples fór í íbúðina, tí eingin hevði borið eyga við kvinnuna ella børnini síðani hósdagin. Inni í íbúðini fann løgreglan líkið av mammuni og teimum fimm børnunum, sum vóru millum 11 mánaðir og níggju ár. AP skrivar, at tann 33 ára gamli pápin fór við flogfari til Haiti fríggjadagin, og hóast hann ikki er skuldsettur, vil løgreglan sum vera man fegin hava orð á hann.

# Selja útnorður úr Danmark

**Grønlendski ferðavinnuráðharrin, Ove Karl Berthelsen, sigur, at grønlendingar arbeiða við at flyta ferðavinnustevnuna aftur til Grønlands**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ferðavinnustevnan Vestnorden Travel Mart, sum mikudagin og hósdagin varð hildin á Scandic Copenhagen við luttøku úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum, er løgd aftur um.

Stevnan varð skipað við fundarborðum – og ikki básum, sum hevur verið vanligt. Hesaferð vóru tað keyparar, sum settu dagsskránna og lótu seljararnar vita, hvønn tey høvdu hug at venda sær til.

Íslendingar vóru nógv best umboðaðir á ferðavinnustevnuni við umleið 80-90 seljarum og keyparum. Grønlendska og føroyska luttøkan var umleið hin sama, tó við heldur fleiri umboðum úr Grønlandi.

Annað hvørt ár er Ísland vertur, og annað hvørt ár er Grønland ella Føroyar vertur.

Næsta ár verður Vestnorden Travel Mart soleiðis aftur í Íslandi.

### Selja úr Danmark

Hetta er aðru ferð á rað, at Grønland velir at hava stevnuna í Keypmannahavn heldur enn í Grønlandi.

Ymiskar meiningar eru um hetta. Tað eru tey, sum halda, at Keypmannahavn er nógv høgligari, tí tað er bíligari at ferðast til Danmarkar, og haraftrat eru fasilitetirnir betri enn í Grønlandi.

Onnur halda, at Grønland hevði havt størri møguleikar at selt seg sum ferðamannaland, um keyparar við egnum eygum sóu landið og tey tilboð, sum landið hevur at bjóða.

Hetta halda onnur ikki hevur so stóran týdning.

Tá Føroyar eru vertland, verður stevnan altíð hildin í Føroyum, og sum fyriskiparar hava føroyingar gott orð á sær.

Tað hevði verið óhugsandi, at ferðavinnan í Føroyum vildi lagt Vestnorden Travel Mart í Keypmannahavn.

Sum skilst, arbeiða grønlendingar við ætlanunum um at halda stevnuna aftur í Grønland, har hon eisini hevur verið áður.

Hetta kunngjørdi grønlendski ferðavinnuráðharrin, Ove Karl Berthelsen, eisini eftir ráðharrafund, tá vit hittu hann.



*Í forhøllini, har skrásetingin av luttakarum fór fram, høvdu grønlendingar ein útstappaðan oksa og eina útstappaða ísbjørn*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Vestnorden Travel Mart varð hildin á Scandic Copenhagen í Keypmannahavn við luttøku úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ov professionell

Tað vóru eisini tey, sum á Vestnorden Travel Mart hildu, at stevnan kanska er vorðin ov professionell, og at tað er verri at fáa røttu sambondini við tað, at umhvørvið á Scandic Copenhagen er so stórt.

Haraftrat kemur, at tú kanska hevur verri við at halda upp á fólkið, sum luttekur á slíkum stevnum, tá tú ert í einum stórbýi sum Keypmannahavn.

Tó skulu grønlendingar eiga, at teir á ymiskan hátt royndu at seta sín dám á Vestnorden Travel Mart.

Longu, tá tú komst inn í forhøllina á stóra hotellinum, har skrásetingarnar av luttakarum fóru fram, stóð ein útstappaður oksi og ein útstappað ísbjørn. Tá vit fregnaðust, um hesi bæði stóru og hábærsligu dýrini høvdu nakað við Grønland sum vert fyri Vestnorden Travel Mart at gera, var svarið ja.

- Hesi bæði dýrini standa á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn, og vit hava havt tey við okkum til ymisk tiltøk ymsastaðni í Evropa. Soleiðis hava bæði oksin og ísbjørnin verið við okkum, tá vit hava verið úti sum land, eisini í onkrum stórbýi.

Tað søgdu fólk, sum umboðaðu Grønland á Vestnorden Travel Mart.

Tá galladøgurði var hóskvøldið, sum stevnan varð liðug, settu grønlendingar eisini sín dám á við sangi av ungum fólki í hátíðarligum grønlendskum búnum.

# Ísland stóran vøkstur í ferðafólkatali

**Sum einasta land í útnorði kann Ísland í ár vísa á ein stóran vøkstur í talinum av ferðafólki. Hetta upplýsti íslendski ferðavinnuráðharrin, Katrín Júlíusdóttir, á Vestnorden Travel Mart**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast tað hevur verið trupult hjá íslendskari vinnu, síðan landið rendi seg í stóra fíggjarliga kreppu, hevur ferðavinnan í Íslandi kotini havt góðar dagar.

Eftir fundin, sum var ímillum ferðavinnuráðharrarnar í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, upplýsti Katrín Júlíusdóttir, ferðavinnuráðharri Íslands, at íslendska ferðavinnan hevur havt góðar dagar í ár.

Hon segði, at Ísland higartil í ár hevur havt ein vøkstur í ferðafólkatali upp á eini 12%.

Ein orsøk er, at alt er vorðið bíligari í landinum, nú íslendska krónuvirðið hevur verið so lágt í mun til virðið av øðrum gjaldoyrum uttan um okkum.

Ísland hevur verið eitt av teimum dýrari ferðamálunum, men fíggjarliga kreppan hevur ført við sær, at hetta er broytt. Aftrat hesum kemur, at Ísland hevur verið rættiliga nógv umrøtt fyri fíggjarligu støðuna í landinum.

Katrín segði, at íslendski parturin av ferðavinnusamstarvinum, sum Ísland, Grønland og Føroyar hava um NATA (North Atlantic Tourism Association), er ein miljón danskar krónur, sum fyri ikki so langari tíð síðan svaraði til 10 miljónir íslendskar krónur.

Nú íslendska krónuvirðið er so lágt, svarar henda eina miljónin í dag til einar 25 íslendskar miljónir.

Kortini ætlar Ísland sær ikki burtur úr hesum samstarvi.

Íslendski ferðavinnuráðharrin segði eisini, at Ísland í næstum fer at byggja eina stóra ráðstevnu- og konserthøll dygst við sjóvarmálan í Reykjavík.

Tó at fíggjarlig kreppa hevur herjað landið, ætla íslendingar sær ikki at gevast á hendur, men vilja líta frameftir - eisini á ferðavinnu-og mentanarøkinum.



*Katrín Júlíusdóttir er ferðavinnuráðharri í Íslandi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*